## Føroysk umboð í Global Games

Ragnvaldur Jensen og Kristian Martin Garðalíð fara at umboða Føroyar í Global Games kappingini, sum verður í Kekkia 5. til 13. juli. Global Games er ein samansjóðing av HM í ymiskum ítróttum, og fara luttakandi íðkararnir at luttaka í frælsum ítrótti, súkkling, kurvabólti, futsal, svimjing, borðtennis, tennis, judo og í inniróðri. 1460 íðkarar frá 40 longum fara at luttaka í kappingini, har Ragnvaldur svimur og Kristian Martin luttekur í frælsum ítrótti. Við á ferðini eru venjararnir Tóra Øre Hansen, svimjing og Sonni Óli Djurhuus, frælsur ítróttur. Ferðaleiðari er Halla W. Reinert.

## Føroyingar til HM í Racerunning

4. til 11. juli bjóða Frederiksberg Handicap-Idræt, Dansk Handicap Idræts-Forbund og CPISRA (altjóða ítróttasambandið fyri spastikarar) vælkomin til VM í RaceRunning. RaceRunning er ein nýggjur og spennandi ítróttur fyri brekað við ringari balansu. Ein racerunner er ein serliga bygd trýhjólað "rennisúkkla" uttan pedalir, soleiðis at balansan ikki er ein trupuleiki. Føroyingar fara at luttaka á leguni og í kappingini, og sendir Ítróttasamband fyri Brekað 13 ára gomlu Astrid Jakobsen. Saman við henni fer Meibritt Djurhuus, venjari.

# Eitt gull til fimleikin

**Fróði Mortensen var ovurfegin um gullmerkið, sum hann vann í lopi um hest**




Jákup Mørk



Fimleikararnir av Isle of Man vóru í serflokki á Oyggjaleikunum, men tað eydnaðist tó Fróða Mortensen at troka seg fram í ovastu røð á seinasta kappingardegnum

Mynd: Álvur Haraldsen

Tað eydnaðist í evstu løtu føroyska fimleikaliðnum at leggja eitt gullmerki afturat rúgvusmikla savninum, sum Føroyar vunnu á Álandi.

Fríggjadagin seinnapart stóð Fróði Mortensen nevnliga ovastur á sigurspallinum, tá hann – saman við einum fimleikara av Isle of Man – hevði hægstu karakter fyri lop um hest.

- Eg føldi tað á mær, beint sum eg lendi. »Yes« hugsaði eg, tá eg stóð perfekt á beinunum. Um tað var nóg mikið til gull, var eg sjálvandi ikki vísur í, men at talan gjørdist um heiðursmerki ivaðist eg als ikki í, segði Fróði Mortensen við Rás2, beint eftir at heiðursmerkið varð komið í hús.

# Jóannis á sjeynda pláss

**Jóannis Joensen rakk 105 dúgvum av 125 møguligum, men fyrsta laka umfarið bar við sær, at hann gjørdist akkurát ov stuttur til finaluumfarið**




Jákup Mørk



Besta føroyska úrslitið í skjóting fekk Jóannis Joensen, tá hann gjørdist nummar sjey í skeet fyri einstaklingar

Mynd: Álvur Haraldsen

Tvær dúgvur. Tað var tað, sum skilti Føroyar frá einum finaluplássi, tá einstaklingakappingin í skeet varð skotin á Oyggjaleikum.

Tey bæði fyrstu umførini av teimum fimm, ið vórðu nýtt sum undankapping til finaluna, var tað annars Magni Dam, sum var besti føroyski skjúttin, men tá hann mest sum heilkiksaði í triða umfarinum, hekk finaluvónin á herunum á Jóannis Joensen.

Jóannis hevði annars bara 19 dúgvur í fyrsta umfarinum, men við 23, 21, 21 og 21 í næstu fýra umførunum, kom hann so nær, sum hann kundi koma.

- Tað var akkurát ikki nóg mikið til finalupláss. Men sjálvur havi eg neyvan skotið so væl áður, so eg havi alla orsøk at vera nøgdur, helt Jóannis Joensen, tá teir seks bestu skjúttarnir vóru farnir undir finaluumfarið.




## Hús í Sørvági til sølu

Vælhildin stór hús í tveimum hæddum, ovara hæddin køkur (nýggjur), stova, nýtt baðirúm, hjúnarkamar v/wc og brúsu, og 1 sovikamar, stór gongd v/trappu til kjallara har eru 3 kømur, stova, vaskirúm/fýrúm og hjallur, + eitt rúm í er klárt til at gerða baðirúm í.

Garasja við grovkøki er bygd føst í húsið, uml. 40 fermetrar.

Garður er stoyptur rundanum og túni omanfyri er alt flisabelagt.

Húsini liggja í barnavinarligum umhvørvið á blindvegi.

Búvídd er uml. 240 fermetrar. Grundøkið 750 fermetrar. Byggiár 1985

**Ringi og hoyri nærri á tlf. 210452 eftir kl 17.**

